# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Stoltleikin endurvunnin

At landsliðið so ruddiliga er dyggasta marknaðarføringin, sum Føroyar eiga, varð so ruddiliga staðfest í vikuni. Til teir báðar landsdystirnar vóru samanlagt fleiri enn 200 útlendsk fjølmiðlafólk, og søluvirðið, sum hetta hevur havt við sær, kann neyvan gerast upp í pengum.

Fyri at øðrum skulu dáma teg, er eisini neyðugt, at tær dámar teg sjálvan, verður sagt. Og fyri tjóðarsamleika og – stoltleikan var hetta helst týdningarmesta læran av øllum farnu vikuna.

Fyri bert lítlum ári síðani høvdu fólk mest sum vent landsliðnum bakið. Eyðmýkjandi stórtap høvdu bumbað sjálvsálitið hjá bæði spælarum og áskoðarum sundur í einki, og atfinningarnar heglaðu oman yvir bæði spælarar og – serliga – venjara.

Tann støðan er broytt. Hóast kritikkurin óivað hevur tikið fast, so hevur landsliðið reist seg. Miðvíst arbeiði, tol og treiskni hava borið frukt, og hóast sensatiónin ikki kom í hesum umfarinum, so var tað so sera nær við. At FSF kann fylla bæði Tórsvøll og Svangaskarð innan fýra dagar ber boð um ein áhuga fyri landsliðnum, sum vit sjáldan hava sæð áður. Ja, ein slíkan áhuga, at tað kennist alt ov leingi at bíða til september, fyrr enn vit aftur sleppa at síggja landsliðið á vølli.

Og vit skulu minnast til, at talan var ikki um nakrar pinkutjóðir, sum vóru á vitjan. Italia eru heimsmeistarar, og skotar eru í løtuni nummar 14 á altjóða styrkislistanum. Á sama lista eru Føroyar nummar 185. Men við seinastu avrikunum í huga, so er hetta bara eitt tal. Føroyski áskoðarin ivast ikki longur í, at liðið er betri enn so. Og tað munnu hvørki italiumenn ella skotar gera.

**Sosialurin**

# Steðgið harðskapi móti kvinnum — á Asfalt

**Amnesty International Føroya deild luttekur aftur í ár á Asfalt. Hesaferð er tað við átakinum »Steðgið harðskapi móti kvinnum«**

ASFALT

*Amnesty International Føroya Deild*




Harðskapur ella hóttanir um harðskap ávirka lívið hjá kvinnum kring allan heimin. Hagtølini um harðskap móti kvinnum tala fyri seg: Ein av trimum kvinnum er fyri harðskapi. Oftast er tað ein í familjuni ella ein hon kennir, sum fremur harðskapin. Evroparáðið hevur staðfest, at harðskapur móti kvinnum er største einstaka orsøkin til deyða ella avlamni hjá evropiskum kvinnum í aldursbólkinum 16 til 44 ár. Fleiri kvinnur doyggja ella missa heilsuna av harðskapi enn av krabbameini ella ferðsluvanlukkum.

**Føroyar – einki undantak**
Í Føroyum er tað bert Kvinnuhúsið, ið hevur útgreinað hagtøl av harðskapi ímóti kvinnum. Samanbera vit hesi hagtøl við kvinnuhús í londunum rundan um okkum, so eru tey á sama støði pr. íbúgva. Tískil er onki, ið bendir á, at Føroyar er nakað undantak

**Ábyrgd**
Harðskapur móti kvinnum er ikki "natúrligur" ella nakað »sum ikki slepst undan«. Harðskapur eigur ongantíð at góðtakast, tolast ella rættvísgerast. Øll – einstaklingar, kommunur, stjórnir og altjóða felagsskapir – hava ábyrgdina av at taka stig til at steðga harðskapinum og bøta um tann skaða og tær líðingar, hann er atvoldin til.

Harðskapur móti kvinnum er ikki bert eitt brotsverk, men eisini eitt brot á grundleggjandi mannarættindini hjá kvinnum.

**Átakið hjá Amnesty**
Átakið varð sett í verk í 2004, og er ætlað sum eitt ískoyti til rørslurnar fyri kvinnurættindum um allan heim. Endamálið við átakinum er at samtykkja lógir, ið tryggja kvinnum javnstøðu, at avtaka lógir, ið stuðla uppundir harðskap móti kvinnum, at skipa hjálpartiltøk og fáa tey at virka, og fram um alt at broyta hugburð, fordómar og siðir, sum fremja og styrkja harðskap móti kvinnum.

**Steðgið harðskapi móti kvinnum á Asfalt!**
Føroya deild hevur, sum partur av átakinum, valt at varpa ljós á trupulleikan á ein heldur øðrvísi hátt og hevur í hesum sambandi heitt á nøkur ung fólk um at standa fyri einum tiltaki á Asfalt. Uttan at avdúka ov nógv, verður talan um eitt tiltak, har dansur, teatur, tónleikur og kunning verður tvinnað saman við tí endamáli at skapa tilvitan millum fólk. Høvi verður hjá fólki at uppliva tiltakið fríggjakvøldið klokkan 20 og leygarkvøldið klokkan 22.30 á pallinum uttan fyri Margarinfabrikkina.

# Hugnaligt festivaløki á jóansøku

**Jóansøkufestivalurin nærkast, og heimasíðan hjá festivalinum avdúkar nú, hvussu og hvar festivaløkið verður í ár**

FESTIVALUR



Jansokufestivalurin.com avdúkar nú, at festivalurin verður á bryggjuni á Tvøroyri í ár. Framvið stak hugnaligu pakkhúsunum hjá Thomsen er ætlanin at hava Jóansøkufestivalin og tekning er gjørd, sum vísir eitt hugnaligt festivalumhvørvi, har John Lawton, Teitur, Side Effect, Crawling Blue og onnur sleppa at royna seg. Umframt eru smærri konsertir í Pubbini og í Klubbanum, har eittnú Brandur Enni fer á pall.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.